KRINGVARP FØROYA

## Programmedarbeiðarastarv

**Í Kringvarpi Føroya er starv sum programmedarbeiðari leyst at søkja. Talan er um eitt starv á tíðindadeildini í útvarpinum. Starvið verður at seta skjótast gjørligt.**

Tann, ið verður settur, skal kunna arbeiða bæði við tíðindum og øðrum sendingum. Arbeiðið er skipað í vaktum við skiftandi arbeiðstíðum.

**Krøv til umsøkjaran:**
- útbúgving sum journalistur ella journalistiskar royndir.
- góð evnir at orða seg skrivliga og munnliga.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt spennandi og áhugavert arbeiði í einum umhvørvi, sum er í støðugari menning.
- eitt umhvørvi, har vit leggja dent á persónliga menning.
- eitt sjálvstøðugt arbeiði.

**Vit ynskja:**
- at tær dámar at arbeiða í skiftandi vaktum, eisini uttanfyri vanliga arbeiðstíð.
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð evnir at samstarva í bólki.
- at tú dugir at loysa trupulleikar, tá ið á stendur.
- at tú hevur góð samstarvsevni og kann geva íkast til menning av arbeiðsplássinum.
- at tær dámar at skapa nakað sjálv/ur.

**Setanartreytir:**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið. Umsóknir skulu vera Kringvarpi Føroya í hendi í seinasta lagi mánadagin 29. oktober 2007.

Nærri upplýsingar um størvini kunnu fáast við at venda sær til Jóhann Mortensen, tíðindaleiðara, tlf. 347500.

***Kringvarp Føroya***

*Norðara Ringvegi · Postboks 1299*
*110 Tórshavn · tlf. 347500.*

# Dagrøktari



Tórshavnar kommuna søkir eftir dagrøktara í Kollafirði at byrja skjótast til ber.

**Vit bjóða**
- eitt sera sjálvstøðugt og fjølbroytt starv, har tað heimliga umhvørvið hevur stóran leiklut í gerandisdegnum
- hollan stuðul frá økispedagogunum í dagrøktarskipanini
- at ein triðingur av lønini verður skattafríur

**Vit vænta at**
- tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- hølini, har børnini verða ansað, eru hóskandi
- møguleikar eru fyri uttandura virksemi

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríur.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Trønd Ennistíg, dagrøktarleiðara, tlf. 302010, lokal 1089, teldupostur: trondur@torshavn.fo

**Umsókn**
saman við royndum, upplýsingum um útbúgving og møguligum viðmælum skulu sendast Dagrøktarskipanini, Postboks 32, 110 Tórshavn.

**Tórshavnar kommuna**

**Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli**



Tlf. 33 28 20 / 21 18 88 • Fax. 33 36 25 • e-mail: mss@skulin.fo

## Miðvágs-Sandavágs kvøldskúli

**Veturin 2007/2008**

**Hesi tilboð verða í Miðvágs-Sandavágs kvøldskúla í vetur:**

| LÆRUGREIN | LÆRARI | TÍÐ | TILMELDING |
|---|---|---|---|
| Felagskór | Vágakórið | Mánadag kl. 19.30 | 332807 |
| Ungdómsorkestur | Katrin Jørgensen | Mánadag | 332498/257693 |
| Ungdómskór | Anna Katrina Petersen | Mikudag | 281459 |
| Teldulæra-Word/Excel | Árni Frederiksen | Mánadag kl. 19.30 | 332968 |
| Veving | Poulina Jensen | Eftir avtalu | 322344/212344 |
| Ferðslulæra/prutl | Jógvan Páll Joensen | Eftir avtalu | 332820 |
| Málningalist | Pól Skarðenni | Mánadag kl. 19.00 | 333646 |
| Harmonikuspæl | Óli Johannesen | Mánadag kl. 18.00 | 333170/222593 |
| Gittarspæl | Holgar Jacobsen | Týsdag kl. 19.00 | 332025/214025 |
| Føroyskt f./útlendingar | Marianna W. Olsen | Eftir avtalu | 222596/218820 |

Luttøkugjaldið, sum skal gjaldast fyrsta kvøldið, er
fyri veving kr. 400
aðrar lærugreinir kr. 300

Byrjað verður eftir heystfrítíðina ella eftir avtalu við læraran. Øll undirvísing er treytað av nóg stórari næmingaluttøku og játtan.




Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við